## UTTAN ÚR HEIMI

### Heldur íløgur uttanlands

Í norsku fíggjarvinnuni fýlast tey á, at norskar ídnaðarfyritøkur flyta ov nógvar pengar av landinum heldur enn at gera íløgur heima í Noregi.

Í einari frágreiðing, sum bleiv almannakunngjørd mánadagin, stendur, at avlopið hjá ídn-aðinum er vaksið nógv tað seinasta árið, men at fyritøkurnar eru givnar at gera íløgur í framleiðslutól. Sagt verður, at íløgurnar minkaðu meiri enn 16 prosent í fjør, gongdin er tann sama í ár, og næsta ár verður minkingin umleið sjey prosent minni enn í ár.

Harafturímóti veksa tær norsku íløgurnar í útlondum skjótt. Í fjør gjørdu fyritøkurnar íløgur fyri meiri enn 20 milliardir krónur uttanlands, samstundis sum tær rindaðu skuldina í Noregi niður heldur enn at gera íløgur har. Búskaparfrøðingarnir í fíggjarvinnuni siga í frágreiðingini, at hendan gongdin kann koma norska ídnaðinum aftur um brekku í framtíðini, kemur ikki vend í.

### Leita eftir hópdrápsmanni

Seinastu tveir mánaðarnar hevur løgreglan í amerikanska býnum Kansas City funnið líkini av seks fólkum, sum øll vóru myrd, og tí er illgruni um, at ein hópdrápsmaður er farin at gera um seg í býnum.

Tað fyrsta líkið bleiv funnið í juli, og tað seinasta bleiv funnið seinasta hósdag. Tey seks vóru rúsevnismisnýtarar og høvdu eisini samband við skøkjulevnað. Í fyrstani helt løgreglan ikki, at nakað samband var ímillum tey seks morðini, men nú verður hildið, at tað er helst sami persónur, sum hevur beint fyri øllum seks. Tí hevur løgreglan í Kansas City biðið samveldisløgregluna FBI um hjálp, skrivar AP.

Tey seks líkini vórðu funnin í tómum húsagrundum og húsum, sum eingin býr í longur, og øll vórðu funnin í einum býarparti, sum er kendur fyri rúsevnismisnýtslu og skøkjulevnað. Løgreglan vil ikki siga, hvussu tey seks vórðu myrd.

### Valstríðið byrjað

Um ein mánað sleppa afghanar fyri fyrstu ferð at velja forseta, og í gjár fór valstríðið í gongd.

10,6 milliónir fólk hava valrætt, og tær næstu fýra vikurnar skulu Hamid Karzai, forseti, og hini 17 valevnini sannføra veljararnar um, hvønn teir eiga at velja. Høvuðsevnini í valstríðnum eru trygdin, fátækradømið og harðskapurin, sum framvegis setir sín dám á gerandisdagin hjá nógvum afghanum. Útlendskir eygleiðarar siga, at valið er sera týdningarmikið, tí úrslitið verður avgerandi fyri framtíðina hjá friðartilgongdini, sum ofta hevur hingið í einum kløunum tráð.

Hildið verður, at Hamid Karzai hevur bestu møguleikarnar at vinna forsetavalið, men tað stóra talið á valevnum vísir, hvussu spjaddir afghanar eru. Eygleiðarar siga, at tað kann væl henda, at neyðugt verður við einum valumfari afturat. Bara ein kvinna er ímillum tey 18 valevnini.

### Rann hálvnakin út á vøllin

Ein kvinna, sum rann hálvnakin inn á vøllin undir landsdystinum ímillum Letland og Portugal seinasta leygardag, kann enda í fongsli.

54 minuttir vóru farnir av dystinum, tá kvinnan rann inn á vøllin, og tað eydnaðist henni at kroysta ein av spælarunum, áðrenn vaktarmenninir fingu hana útum. Sjálv greiddi hon frá, at hon hevði gjørt av at fara inn á vøllin, tí hon visti, at fólk fóru at fagna henni. Men løgreglan heldur ikki, at tilburðurin var serliga skemtiligur, og sambært Aftenposten kann kvinnan fáa tvey ára fongsul.

Tað stóð á jøvnum 0-0 ímillum Letland og Portugal, tá kvinnan rann inn á vøllin, men tá dómarin floytaði dystin av, høvdu portugisar vunnið 2-0. Portugisiski venjarin, Luiz Felipe Scolari, helt fyri á tíðindafundi aftan á dystin, at tann hálvnakna kvinnan vendi dystinum. Kanska var nakað í tí. Í hvussu er komu bæði málini beint aftan á tilburðin.

# Sorgin vend til øði

**Túsundtals russar mótmæltu í gjár yvirganginum í landinum. Samstundis harðna atfinningarnar at myndugleikunum**

RUSSLAND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Hjá nógvum russum er sorgin vend til øði inn á myndugleikarnar*

*Mynd: Reuters*

Dagurin í gjár var almennur sorgardagur í Russlandi til minnis um tey, sum doyðu í gíslatøkuni í Belsan. Men hjá nógvum russum var sorgin blandað við øði og misnøgd, og fleiri av teimum russisku bløðunum fara illa við myndugleikunum.

Blaðið Vedomosti legði í gjár myndugleikarnar undir at bera ósannindi um alt, sum hevur við yvirgangin í seinastuni at gera. Blaðið vísti á, at myndugleikarnir søgdu seg hava tamarhald á støðuni í Belsan, men at tað var ikki so. Myndugleikarnir søgdu eisini, at trygdardeildirnar vóru væl vandar og dugdu síni ting, men tað var heldur ikki so. Teir lúgva, so vit vita ikki, hvat vit skulu halda, skrivaði blaðið.

Eitt annað blað, Vrenja Novosti, skrivar, at trygdardeildirnar høvdu als ikki eftirlit við tí, sum hendi. Sambært blaðnum vóru tað ikki trygdarhermenn, sum skutu afturímóti, tá gíslarænararnir fóru at skjóta, men heldur vanligir hermenn og sivilfólk, sum høvdu tikið vápn við sær. Sambært blaðnum løgdu trygdardeildirnar ikki uppí fyrr enn ein hálvan tíma seinni.

Blaðið Moskovskij Komsomolets skrivar beinleiðis, at tær russisku trygdardeildirnar eru óbrúkiligar. Tað prógvaðu tær í Beslan, skrivar blaðið.

Fleiri av teimum russisku bløðunum finnast eisini at Vladimir Putin, forseta. Hann hevur skýrt gíslatøkuna í Belsan altjóða yvirgang, men bløðini vilja vera við, at hann bara roynir at skáka sær undan kríg-num í Kekenia, sum er tann veruliga orsøkin. Men forsetin hevur heldur onga ætlan um, hvussu kreppan har skal loysast, skriva bløðini.

# Ísrael ætlar framvegis at sleppa av við Arafat

**Hóast altjóða mótmæli hevur Ísrael ikki slept ætlanini at flyta palestinska forsetan burtur haðani**

ÍSRAEL

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ísraelski verjumálaráðharrin, Shaul Mofaz, sigur nú, at Ísrael hevur ikki slept ætlanini at reka palestinska forsetan, Yasser Arafat, burtur.

Í samrøðu við útvarpið hjá herinum segði Mofaz mánadagin, at stjórnin heldur fast um avgerðina at reka Arafat burtur.

– Vit fara at finna tann rætta dagin og tann rætta háttin, segði Mofaz.

Sambært blaðnum Haaretz tók stjórnin avgerðina aftan á eina røð av palestinskum sjálvmorðsatsóknum í fjør. Blaðið skrivar, at verður avgerðin framd í verki, kann tað annaðhvørt hava við sær, at Arafat verður fluttur av Vestara Áarbakka, ella at hann verður myrdur.

Arafat hevur sitið avbyrgdur í Ramallah á Vestara Áarbakka seinastu trý árini, og altjóða samfelagið hevur ávarað Ísrael ímóti at reka hann burtur ella at beina fyri honum.

# Skal giftast fyri 13. ferð

**Kongurin í Swazilandi skal aftur giftast. Frammanundan hevur hann 12 konur**

Tann 36 ára gamli kongurin í Swazilandi, Mswati 3., er kendur fyri at hóreiggja sær sum eitt oyðsl, sjálvt um land hansara er eitt tað fátækasta í øllum Afrika. Herfyri kunngjørdi hann, at hann ætlar sær at byggja teimum tólv konunum hvør sína borg, og fyrr í ár ætlaði hann at keypa sær eitt flogfar fyri góðar 300 milliónir krónur. Tann ætlanin var kortini av ongum.

Nú hevur hann ístaðin fyri gjørt av at fáa sær eina konu aftur at teimum 12, sum hann hevur. Hon er bert 16 ára gomul og hevur fyrr tikið lut í einari vakurleikakapping, skrivar The Independent.

Men hann hevur til at breða. Alment hevði pápi hansara 120 konur, men tey flestu vilja vera við, at tær vóru væl fleiri enn tað.



